# Frísk lívsgleði, symbolsk kær



LIST

*Øssur Johannesen*

Ein tann størsti og kendasti og mest originali ella sermerkti listamaðurin í danskari list er so avgjørt Henry Heerup.

Hann var føddur í 1907 í Keypmannahavn. Vaks upp á Nørrebro tætt við Runddeilin saman við mammu síni í trongum og fátækum korum. Pápan kendi hann ikki nógv til. Mamman arbeiddi á einum harratoyshandli í Nørrebrogade. Sum 20 ára gamal kom hann í 1927 inn á Kunstakademiið, har hann gekk til 1932 og hevði Aksel Jørgensen og Ejnar Nielsen sum professarar. Hetta vóru lukkulig ár hjá honum, trý bestu í hansara lívi hevur hann sjálvur sagt.

Tey 10 árini frá 1927 til 1937, tá hann fekk gjøgnumbrot hjá listabólkinum Groningen, vóru fátæk ár hjá hansara lítlu familju, tey fingu sosialhjálp. Henry Heerup bleiv giftur við fyrru konuni Emilie Westh og tey fingu børnini Ole og Nanna.

Heerup bleiv giftur við síni seinnu konu Marion Brock í 1958. Heerup var limur í listamannabólkinum Decembristerne í 1949 og fram. Hann var eisini við í listabólkinum Linien saman við Surrealistunum og tí kenda listabólkinum Cobra saman við m.a. Asger Jorn, Carl Henning Pedersen, Karel Appel og øðrum.

Henry Heerup búði í Vanløse og hevði ein stóran urtagarð í Rødovre, har í hann arbeiddi uttandura við málningum og myndahøgging alt árið. Hann arbeiddi eisini við grafikki.

Henry Heerup skapti sín egna heilt serliga stíl.

Hann blandaði eina fríska barnsliga naivismu saman við eitt symbolst figurativt og ekspressionistist myndamál, ið tók støði í menniskjanum, í lívsgleðini og í poesini, í kærleikanum og søgunum, sum Heerup upplivdi og segði frá á sínum ljósa og ævintýrkenda lívsvegi.

Og hetta sæst og kennist aftur í hansara serligu ljósu, poetisku, organisku og lívsjáttandi myndaverð, sum var sera umfatandi í hansara listarliga og andaliga frælsu hugmyndaverð.

Eitt sunt frískt og frælst poetiskt hjarta skínur týðuliga ígjøgnum alla hansara bestu list.

Ein sjálvsmynd er frá 1924, her hava vit eitt dømi uppá eina av hansara fyrstu naturalistisku myndum. Hann hyggur upp á okkum við álvarsomum eygum, frammanfyri seg eitt lørift, pensilin í hondini, hann er konsentreraður og veit fult væl longu tá sum ungur, at tað krevst nógv skapandi orka og stríð í einsemi og lívsroyndir, talent og vitan fyri at kunna fordjúpa seg hjartaliga, sálarliga og intellektuelt, fyri at kunna skapa stóra list og tað er hansara lívsavbjóðing og uppgáva fullkomuliga at hugsavna seg og tæna listini og øllum dimensiónum og aspektum.

AT granska, leita og finna listarliga poesi í tí óendaliga ríkidømi í finst í lívinum í hjartanum, í sálini og tankaverðini, í menniskjanum og náttúruni, bæði í tí innari og tí ytru verðunum.

Vanløsemadonna eitur málningur frá 1934. Ein ung mamma í einum forstaði til København í gerandisligum bláum frakka við stórum lummum, reyðari blusu. Hon hevur sett eitt nýtt lív í heimin, frísk gleði, men eisini álvarslig ábyrgd kennist hjá hesi mammu, sum heldur um sítt barn, sum er ljóst og reint og óskyldugt eins og øll onnur børn eru tað. Øll børn verða fødd óskyldig og sálarliga rein inn í hesa verðina, meðan verðins óndskapur og sálarliga dálking seinni ger innrás í lívinum. Aftan fyri mammuna er eitt ljóst sólarljós, eyguni hjá mammuni eru vøkur og eisini álvarsom. Hetta er ein sera einføld mynd, hampuliga góð, men avgjørt ikki nakað meistaraverk.



Mamma gevur bróst eitur málningur frá 1934. Vit síggja eitt lítið barn fáa bróst, man sær armar og hendurnar hjá mammuni, men ikki hennara andlit. Hetta er ein mynd av mammuni, sum lívsins fríska upprunakelda hjá hesum lítla barnið.

Sæl eru tey, sum ongantíð gloyma at í sveittaroykinum hjá eini kvinnu hevur heimurin sítt uppihav, skrivar Jóanes Nielsen í einari yrking, eitt hóskandi sitat at skoyta uppí viðvíkjandi hesi myndini.

Ein einføld og beinrakin mynd av mammuni og barninum og tí djúpa ódeyðliga kærleikanum, sum altíð hevur hildið heiminum á flogi...

Í Baðikarinum eitur málningur frá 1935. Frískur og glaður og nývaskaður liggur sonur Heerup í grøna baðikarinum. Mamman er málað sum ein poetisk symbolsk verndarvera, ið heldur vakt, tekur sær av barninum. Gul bløð eru um høvur hennara. Eitt hjarta við eygum sæst omanf yri barnið, og úr hondini á mammuni kemur ein ælabogi. Ein meistarlig mynd eisini í litum.

Kvinnusólin skínur frá 1940 eitur ein persónlig erotisk mynd. Vit síggja Heerup sita við borðið saman við konuni, dóttrini og mammuni. Á vegginum ein einfaldur málningur. Ein gullitt sól skínur ígjøgnum vindeygað inn í stovuna, aftan fyri sólina síggja vit nakna kvinnu og sólin er málað har ið deiliga kvinnureyvin er! Er tað neyðugt at siga meira! Reyvin og kusan sum lívgevandi sólin hjá Heerup sjálvum! Og lívmóðurin sum ein lívgevandi skapandi sól, ið føðir okkum øll gávumild inn í hesa verðina og stjørnurnar, ið tekna okkara lívslagnu saman við gerningum okkara á lívsins leið, ið mynda heimin upp á gott og ónt.

Sólin, ið rísur upp úr havsbrúnni gevur okkum ljós og rópar okkum til dagsins gerning. Fullmánin, ið rísur upp í endaleysa náttarmyrkrinum og biður okkum góða hvíld og ferð inn í løgnu duldu dreymaverðina. Náttarravnarnir elska friðin í náttini.

Elskovshjólið eitur standmynd frá 1944. Vit síggja eitt par halda um hvørt annað, og aftan fyri tey og sum partur av teimum síggja vit súkluhjólið rundan um tey sum eina Auru, hjólið sum eitt symbol uppá, at man við hjartanum og kærleikanum ferðast inn í hvørt annað og rørir og elskar tann viðkvæmasta og kenslubornasta partin í hvørjum øðrum – kropsliga hjartaliga og andaliga. Ein sera beinrakin og einføld mynd.

Sum myndahøggari brúkti Heerup alt møguligt tilfar, hann fann liggjandi, træ og jarn og steinar og alt møguligt. Hann setti tað saman og fekk eina poetiska listarliga heild burtur úr tí.

Ymiskir figurar og formar funnu saman í eina hugflogsríka heild, fleiri nærkast tí abestrakta.

Krígsmamman frá 1943 er málað undir seinna heimsbardaga, sum Heerup jú upplivdi á sín egna kropp.

Mitt í síggja vit Krígsmammuna, nakin, hon er blóðreyð, myrk og grumsut, sum útrykkir eitt myrkt, dálkað blóðbað. Andlitið er demoniskt, men hevur eisini sorgina í sær. Eitt tár rennur úr øðrum eyganum. Børn spæla í neðra, tætt við ein kirkjugarð, svartir krossar rísa upp úr blóðreyða vøllinum og